## Panduro fyri Auken

Tann 27 ára gamla Maja Panduro hevur tikið sæti í Fólkatinginum eftir Svend Auken, sum doyði fyri stuttum. Maja Panduro, sum lesur samfelagsfrøði við lærda háskúlan í Århus, er ættað úr Randers, har hon hevur verið býráðslimur síðani 2005. Á seinasta fólkatingsvali stillaði hon upp fyri Sosialdemokratarnar í Randers og gjørdist varalimur. Tí hevur hon nú tikið við eftir Svend Auken. Fólkatingið mintist í gjár Svend Auken, sum doyði fyri einum mánaði síðani. Hann var fólkatingslimur í samfull 37 ár og var ellisformaður á tingi, nú hann doyði.



## Ivi um veðurlagsavtalu

Tá amerikanski forsetin, Barack Obama, fer aqt halda røðu í Kongressini í kvøld, eru tað ikki veðurlagsbroytingarnar, sum eru høvuðsevnið, men heldur stríð hansara fyri einari nýskipan á heilsuøkinum. Eingin ivi er kortini um, at Obama leggur stóran dent á at fáa eina veðurlagsavtalu í Keypmannahavn í desember, men heilsunýskipanin hevur kortini fremri raðfesting. Tað kann hava við sær, at eingin avtala fæst á ráðstevnuni í Keypmannahavn, sigur DR. Harafturat er tað ein sannroynbd, at nógvir senatora sera spurnartekin við ta ætlaðu veðurlagsavtaluna, tí hon fer at kosta arbeiðapláss.

# Kommunur eiga ikki at fáa skúlarnar at umsita

**Formaðurin í Lærarafelagnum hevur nú broytt hugsan um, hvussu fólkaskúlin skal umsitast**

SKÚLAREFORMUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg havi altíð hildið, at fólkaskúlin skuldi verðið lagdur undir kommunurnar at verða umsitin.

Tað sigur Magnus Tausen, formaður í Lærarafelagnum.

Men tað heldur hann ikki longur.

- Eg havi nú broytt hugsan á hesum øki, tí nú eri eg komin til tað sannføring, at allur fólkaskúlin eigur at verða umsitin úr einum staði og tað er í mentamálaráðnum.

Spurningurin er so, hví formaðurin í Lærarafelagnum er komin til hetta erkennilsi.

- Landsins myndugleikar hava í nógv ár roynt at eggja til kommunurnar samskipa seg betri. Men tað hevur verið at kalla úrslitaleyst og tað sæst eisini aftur í, hvussu fólkaskúlin er skipaður.

Avleiðingin av tí er, at fólkaskúlin er alt ov ósamskipaður, tí hvør kommuna situr hvør í sínum lagi og sætar sær og sínum.

### Fáa ikki nóg mikið

Magnus Tausen sigur, at tað er neyðugt, at skúlaverkið fær so nógv sum gjørligt fyri hvørja krónu.

- Tað er okkara skylda, men tað fáa vit ikki í dag í tað, tí tað er ikki rationelt at býta játtanina út á yvir 50 sjálvstøðugar skúlar.

- Eg eri sannførdur um, at skal tað eydnast at rationalisera fólkaskúlan nakað sum munar, er tað neyðugt, at øll ábyrgdin liggur á einum og sama staði og tað skal vera í eini miðsavnaðari fyrisiting.

Í løtuni er ábyrgdin tvíbýtt, tí tað eru kommunurnar, sum hava ábyrgdina av skúlabygningum og útgerðini, men at tað er landið, sum umsitur innihald og læraralønir.

Í politisku skipanini hevur tosað verið um at leggja allan skúlan undir kommunurnar at umsita.



*Tað hevur gingið illa at samskipa fólakskúlan sum støðan er nú og tí haldi eg, at tað er neyðugt, at øll ábyrgdin fyri fólkaskúlan verður løgd á einum stað og tað skal vera í mentamálaráðnum,*

Men Magnus Tausen heldur, at vit eiga heldur at fara hinvegin, so at eisini skúlabygningarnar og útgerð og annað, sum kommunurnar umsita nú, somuleiðis verða miðsavnað undir mentamálaráðið at umsita.

### Útveita ábyrgd

Men samstundis tekur Magnus Tausen avgjørt undir við, at skúlaøkini verða gjørd størri, so at vit framhaldandi ikki hava tíggjutals skúlaøki, sum vit hava nú, men bara hava eini fimm til sjey skúlaøki, sum lagt hevur verið upp til.

- Og um Mentamálaráðið so útveitir ein part av umsitingini til tey stóru skúlaøkini, er ein onnur søga. Men tað eigur ongin ivi at vera um, at tað er Mentamálaráðið, sum situr við evstu ábyrgdini

Hann heldur, at samstundis eigur fólkaskúladeildin í mentamálaráðnum er verða ment, so at hon verðuliga kann virka sum ein mennandi drívmegi til frama fyri framburði.

Ein atfinning ímóti at leggja skúlarnar undir kommunurnar at umsita er, at so er vandi fyri, at skúlatilboðið verður ójavnt, alt eftir, hvussu væl ella illa kommunan er fyri?

- Tað kann eg verða samdur í. Men vit kunnu eisini skjótt semjast um, at sum støðan er nú, hava vit longu eitt ógvuliga ójavnt skúlatilboð, alt eftir, hvar í landinum, vit eru. Summastaðni eru framkomnir skúlar, men í skúlaøkinum beint við, er skúlin uppslitin.

- Tað er eisini ymiskt, hvussu frammaliga tær ymsu kommunurnar raðfesta skúlan. Tað slepst heldur ikki uttanum, at tað er ógvuliga ymiskt, hvørji tilboð teir einstøku skúlarnir klára at veita næmingunum, eitt nú í sambandi við serundirvísing og fakligan kunnleika í teimum ymsu lærugreinunum.

- Tað hevur ikki gingið væl at samskipa fólkakúlan og tí er tað neyðugt, at landið verður skipað í nógv størri skúlaøki, enn í dag, har at kalla hvør kommuna er eitt skúlaøki.

# Væl skiljandi at Helena vil hava arbeiðsfrið

**Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at fólkaskúlin er so kensluborin, hann skilir væl, at landsstýriskvinnan í mentamálum heldur kortini tætt at kroppinum**

SKÚLAREFORMUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg taki fult undir við, at at vit fáa ein skúlareform í Føroyum. Men tað skuldi helst ikki enda sum ætlaði pensjónsreformurin, sum hevur verið ávegis í ein hálvan mansaldur nú, uttan at nakað størvegis er hent.

Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag, heldur tískil, at einasti máti fáa undirtøku fyri einum skúlareformi, er at halda kortini tætt at kroppinum.

Tað var akkurát tað, sum Helena Dam á Neystabø boðaði frá í Sosialinum í gjár, at hon ætlaði at gera.

Hon vildi ikki siga nakað um ætlaða reformin, tí hon vildi hava frið til at fáa málið ígjøgnum politisku skipanina fyrí at finna eina semju.

- Tað er einasti møguleiki hon hevur, tí skal hetta ikki enda sum pensjónsreformurin er neyðugt, at landsstýriskvinnan tryggjar sær politiska undirtøku fyri reforminum, áðrenn hon leggur hann fram.

### Lærarafelagið upp í

Men tað merkir ikki, at Lærarafelagið ikki skal sleppa at seta síni fingramerki á.

- Eg havi onga orsøk til at halda, at landsstýriskvinnan fer at halda Lærarafelagið uttanfyri, tí er tað nakað, hon fær brúk fyri, er okkum sum viðspælarar, ikki sum mótspælarar.

Tí ivast hann ikki í, at Lærarafelagið verður tikið við upp á ráð.

Kortini heldur hann, at tað er óheppið at kikarin verður settur á, at eitt ávíst tal av skúlum skal lata aftur.

Hann sipar til, at í Sosialinum í gjár varð nevnt, at úrslitið av hesum skúlareforminum verður, at tað verða einir 20 skúlar eftir.

- Tað er ikki endamálið at leggja skúlar niður og eg vóni ikki, at tað verður hesin spurningurin, sum verður høvuðs kjakevni. Endar tað í hesi grøvini, er reformurin í vanda, tí tað er so kensluborið.

Magnus Tausen heldur, at kikarin eigur at verða settur á veruliga endamálið við reforminum og tað er at lyfta fólkaskúlan upp á eitt høgri støði.

- Í hesum sambandi er onki at ivast í, at vit hava ov nógvar skúlar, tí sum støðan er nú, vísit tað seg, at tað ber ikki til at samskipa skúlaskapin.

### Ikki stongja

Hann sigur, at hetta merkir ikki, at tað skal neglast upp fyri vindeyguni á nógvum bygdaskúlunum.

- Avbjóðingin verður at finna okkurt endamál at brúka teir til og tað kann vera til serskúlatilboð av ymsum slagi, ella onnur tilboð, har teir koma til størri nyttu enn í dag.

- Tí eins væl og tað eru næmingar, sum hava stórt gagn av at vera í einum størri skúla, eru tað eisini næmingar, har tað hevur stóran týdning at vera í einum lítlum skúla og kunsturin er at samskipa tey bæði.

Tað er eisini vær hugsandi, at skúlar kunnu brúkast til mentanarhús, ella onnur almannagagnlig endamál.